Filmsvika



*Bergur Johannesen ummælir*

# Munirnir lýsa lívið



Tá »Sommerhuset« kemuer at enda situr tú við tí somu kensluni, ið høvuðspersónurin stríðist við. Øvund, sorg, lívsbroytingar eru evnini, sum vera nomin við. Høvuðspersónurin verður flott settur yvirav sínum mótsetningi og síni burturmistu persónligheit

**»SOMMERHUSET«**

★★★★☆☆

Renate er tann mordernaða kvinnan úr stórbýnum. Hon hevur vinkonur og býr saman við systrini. Men tá systurin finnur sær ein drong, byrjar hon at kenna seg einsamalla og roynir at fáa samband við systrina, við at fara ein túr til summarhúsið har tær vóru sum lítlar. Ikki eydnast tað henni at fáa hana við, men fer kortini, við nýggju gentuni, ið hon illa nokk kennir.

Túrurin gerst drúgvur og ymiskleikin millum tær báðar skilir tær sundur. Men við eitt byrjar Renate at síggja lívsgleðina í hesi nýggju vinkonuni, ið ikki er merkt av stórbýarrákinum, eins og hon sjálv er. Øvund og sorg broyta hana og lívið verður sett í perspektiv.

Málið er norskt, og filmurin er ikki tekstaður. Lætt er ikki at skilja alt til tíðir. Kenslurnar hjá høvuðspersóninum eru greitt lýstar gjøgnum atburð og huglag. Men hóast boðskapurin er greiður og persónarnir klárir, tyktist okkurt at vanta. Nógvir leysir endar vóru, ikki einans endin, men ymsar frágreiðingar kundu fylt á leiðini.



# Skapti hvørki áhuga ella spenning

**Hóast »Reprise« er væl umtóktur av nógvum, dámdi mær einki. Skjótu klippingarnar, skiftini millum dreym og veruleika lótu hyggjaran sita við eini kenslu av at mist okkurt týdningarmikið**

**»REPRISE«**

★☆☆☆☆☆

Tað skuldi eitast at ganga við rúkandi ferð, tá ungu vinmennirnir skuldu royna seg um rithøvdunar fyri fyrstu ferð. Annar verður raktur av sálarligari sjúku og hin heldur áfram. Vit flygja lívsleið teirra og teimum avbjóðinum og forðinum, ið yvirgangurin frá at vera barn til at gerast vaksin hevur við sær.

Filmurin var sera sera tungur. Nógvu klippini og manglandi teksturin afturvið Oslo-málinum gjørdu hann torføran at flygja við í. Hóast tað var tað sum hann ongan veruligan rætning hevði. Lívini vóru flygd, men tó so at persónarnir ongantíð komu tær inn at kroppi. Ongantíð kendist tað sum tú var rivin við og spenningurin kring næstu senu reisti seg.

Nógvar vakrar myndir vóru og filmingin var áhugaverd og nærløgd. Til tíðir vóru sjónleikararnir so veruleikakendir, sum um hetta var ein dokumentar.

# Petur gjørdist ein maður upp á ein hálvan tíma

**Ein øðrvísi uppliving. Dramatiskur tónleikur, stívar rørslur og ein rúgva av spenningi. »Peter og ulven« er norskur, men søgan er skrivað av russiska tónaskaldinum Sergei Prokofiev.**

**»PETER OG U LVEN«**

★★★★★☆

Vit fylgja Peter, hann er ein lítil forvitin drongur í eini lítlari bygd. Vit koma t kenna tilveru hansara og vinir hansara, ein dunna og ein kráka.

Gjøgnum filmin gongur søgan gjøgnum klassiska heima-útiheima mynstrið, har Peter fer frá tryggleika, út í eina ókenda ræðandi verð, fyri síðan at venda aftur meira búgvin. Í filminum megnar hann at vinna á tí, ið øll bygdin ræðist, og harvið gerast ein rættur maður.

Hóast einki tos var í filminum, segði tónleikurin alt. Klassisk ljóðføri lyftu dramatikkin og tá á stóð var hjartað í hálsinum. Stívu rørslurnar vóru sum í einum dukkufilmi, als ikki tað, ið Pixar vanliga bjóðar. At byrja við var hetta torført at venja seg við, men sum frá leið økti tað um sjarmuna og bygdi undir persónligheitirnar.

Børnini, ið vóru til hesa sýning, flentu óført at stuttligu hendingunum á ísinum, ið mintu um tær úr Bambi. Samanumtikið tyktist filmurin at vera nógv longri enn einans ein hálvan tíma, als ikki tí ein keddi seg, men tí so nógv passaði inn í hendan film.

